


## Rættarmál í Danmark um yvirgang

Í rættarmálinum har ein dani eru undir illgruna fyri at hava ætlað at fremja fyrireikingar til yvirgangsatsókn verður væntað at nýggjar upplýsingar koma fram í næstum. Hin frammanundan svenskt/bosniski dømdi »Maximus« hevur játta seg til at blíva avhoyrdan fyri rættinum. Undir ákæru í hesum málinum, kallað »Glostrup málið«, situr EH. Hesin hevur sambært ákærunum samstarva við Maximus í fyrireikingum til yvirgang. Verjin hjá EH sigur hinvegin, at nýggjar upplýsingar fara at hava stóran týdning fyri málið.

# Ein arabisk PISA




**Heimsbankin gav í vikuni út eina umfatandi frágreiðing um útbúgving í arabiska heiminum. Har sagt verður, at arabiski heimurin fellur afturút, tá ið tað snýr seg um dygd. Ávarað verður um framtíðina og stórar avbjóðingar, ið koma at standast av arbeiðsloysi. Arbeiðsmarknaðurin verður settur í sentrum. Eitt alt meira sjónligt glopp er nevniliga framkomið gjøgnum síðstu árini millum útbúgving og arbeiðsmarknaðin**

## Miðeystur & útbúgving



**Johan Jacobsen**
johan@sosialurin.fo

Hóast ikki øll arabisk skúlabørn hava verið ígjøgnum nakra PISA-kanning (Tunis, Qatar og Jordan eru undantikin), verður tað kannað í útbúgvingarskipanum í Miðeystri og Norður Afrika. Heimsbankin hevur jú veitt fleiri londum har lán til stórar ætlanir, eisini innan skúlaverk. Í ljósinum av hesum samstarvinum hevur Heimsbankin savna kanningarúrslit saman og kunngjørt tey. Frágreiðingin ber heitið »The Road not Traveled« ella »Hin ógingna leiðin«. Har verður staðfest, at nóg er eftir at gera fyri at útbúgving kann gerast mennandi fyri samfelagsbúskapin í ymsu arabisku londunum, og á somu tíð peikar mann á at útbúgvingarskipanirnar ikki hava framleitt tað, sum arbeiðsmarknaðurin tørvar, og at arbeiðsmarknaðurin ikki er nóg útviklaður til at taka ímóti útbúnu arbeiðskraftini. Í mun til heimspartar sum Asia og Latín Amerika, so haltar arabiski heimurin aftaná. Dentur verður lagdur á, at manglar, sum hava tilknýti til motivatión hjá næminginum (virknari luttøku eisini við foreldrum og størri samsýning við loknan lestur við fleiri arbeiðsmøguleikum) einu megin og hinumegin, skulu myndugleikunum ábyrgdast fyri almenninginum (og ikki umvent), hesar eru útbreiddar forðingar.

### Døpur útlit

Mannatilfeingi hevur serliga nógv at siga fyri framburð og búskap í tí arabiska heiminum. Tí burtursæð frá tí nógvu oljuni, nærum 70 % av heimsins oljukeldum, so hava londini lítið annað virðismikið náttúrutilfeingi. Og afturat hesum kemur tað, ið helst hevur størri og ein meiri bráðfeingis týdning, nevniliga arbeiðsloysi.

Í 60% av øllum fólkatalinum í økinum er undir ein 30 ára aldur – og yvir tey komandi 10 – 15 árini verður tað ein tørvur á upp ímóti 100 milliónir størvum, sigur Marwan Muasher, ein talsmaður hjá Heimsbankanum, við BBC. Og hann leggur afturat við einum setningi, ið ikki so sjálvdan hevur verið frammi í føroyska almenna kjakinum: - Um vit skulu skapa hesi arbeiðsplássini, so skulu vit byrja við útbúgving!

Hesi turru hagtøl, kunnu væl boða frá politiskum ófriði og fólkaflyting, ið hevur uppruna í arbeiðsloysi millum tað yngra ættarliðið, ið er á veg. T.d. eru summar forsøgnir, ið siga, at oljan hjá einum landið sum Sýria fer at renna út uml. 15-20 ár. Tá ið hetta hendir er ilt at siga, hvat kann henda. Útlitini eru ikki bjørt.

### Seinastu 50 árini

Miðskeiðis í 20 øld varð av álvara

## Fakta

Jordan og Kuvait liggja ovast í metingum hjá Heimsbankanum sum lond í økinum við góðum úrslitum, sum fylgja av broytingum innan skúlaverkið. Djibouti, Yemen, Irak og Marokko liggja niðast – hetta er í mun til atgongd til skúla, effektivitet og dygd í útbúgvingini.